## Ræðast sinnalagið hjá McCain

John McCain, senatorur og republikanskt forsetavalevni, hevur lyndi at bresta í øði uttan ávaring, og valbólkurin hjá honum ræðist, at tað kann koma honum aftur um brekku, bæði til valið í november og í forsetastarvinum, skuldi hann vunnið. Konan verjir hann við at illsinnið bert vísir, at hann er kensluborin, men sjálvt góðir vinir óttast fyri hvat kann henda, um hann gerst heimsins maktríkasti maður við atomvápnum beint við hondina, skrivar Sky News.



## Málningur fyri 170 mió

Ein málningur av einari naknari kvinnu er seldur fyri 17,2 milliónir pund, ella umleið 170 milliónir krónur. Talan er um dýrasta listaverk hjá listamanni, ið enn er á lívi. Málningurin, sum er í fullari støðd, er av einari naknari kvinnu og nevnist Benefits Supervisor Sleeping. Tað er týski málarin Lucien Freud, sum hevur málað listaverkið, sum var selt av uppboðssølufyritøkuni Christie's. Tað var ein privatur samlari, sum seldi málningin á einari uppboðssølu í Rockefeller Centre í New York, skrivar enska blaðið The Sun.

# Á veg út um landoddarnar



*Nýggja bjargingarbátastøðin umfatar tríggjar bjargingabátar og tríggjar davidar*

**Sjóvinnudepilin – CMM – er fyritøka, sum skipar fyri skeiðum innan sjóvinnu. Í næsta mánaði taka teir fyrsta stigið at víðka um virksemið, so tað røkkur út um landoddarnar**

SJÓVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tað gerast alsamt fleiri føroyskar fyritøkur, sum víðka um virksemið so tað eisini røkkur út í heim. Í næsta mánaði fer Sjóvinnudepilin – Centre of Maritime Management – at halda skeið hjá útlendskum reiðaríi, og tað kann gerast byrjanin til eitt rættiligt gjøgnumbrot hjá felagnum.

Felagið varð stovnað á sumri 2006, og eigararnir eru Lassi Borðoy, sum eisini er stjóri, Sjúrður Guðjónsson og íløgufelagið Royndin, sum Lív eigur. CMM kann bjóða 22 ymisk skeið, tey flestu innan trygd umborð, sum øll geva prógv. Harumframt eru eisini nøkur onnur skeið, sum felagið kann bjóða.

Í løtuni starvast seks mans hjá felagnum, sum allir eru fyrrverandi sjómansskúlalærarar, og haraftrat eru tveir sjúkrarøktarfrøðingarknýttir at felagnum. Lassi Borðoy, sum er stjóri í felagnum, hevur eisini góða barlast við sær sum stjóri í Atlantic Supply Base í trý ár.

- Ætlanin er, nú vit fara út í heim við virkseminum, at hava tríggjar mans úti nakrar mánaðir, meðan hinir tríggir arbeiða heima, og skifta vit um, sigur Lassi Borðoy.

Hann fílist á, at almenna Trygdarmiðstøðin heldur fýra daga skeið fyri túsund krónur, tí tað hava privat feløg ongan møguleika at kappast ímóti.

Kortini hevur CMM fingið eina rímiliga góða byrjan, og teir hava hildið skeiðir umborð á Strandferðsluskipunum og Norrönu, umframt nøkrum fiskiskipum.



*Lassi Borðoy er stjóri í CMM, sum bjóðar 22 ymisk skeið, serliga innan trygd umborð á skipum, fram*

### Betri umstøður

CMM fer fyrsta dagin at taka eina bjargingabátastøð í brúk úti á nýggju keiini á Viðarnesi. Hetta hendir næstan samstundis sum felagið flytir í nýggj høli á fjórðu hædd á Saltsøluni.

Bjargingabátastøðin umfatar tríggjar bjargingabátar og tríggjar davidar. Eini báturin er innilokaður, og er einasti av sínum slag til venjingar í Føroyum.

Talan gerst um munandi betri hølisumstøður, tá CMM fyrsta dagin flytir inn á fjórðu hædd á Saltsøluni.

- Vit fara at fáa fleiri undirvísingarhølir, kantinu og sjálvandi skrivstovu. Í alt er talan um einar 350 fermetrar, sigur Lassi Borðoy.

Hann heldur, at tørvur er á einari slíkari fyritøku, sum CMM.

- 25% av allari manningini umborð á skipunum hjá Mærsk eru føroyingar, og samlað fyri allan danska farmaflotan eru 15-20% av manningunum føroyingar, vísir Lassi Borðoy á.

Hann er tí spentur upp á, hvussu hendan fyrsta royndin at sleppa inn á útlendskar marknaðir fer at hepnast.

- Stóru reiðaríini eru varin at binda seg til smáar fyritøkur, og tí vilja tær fyrst royna seg fram. Men tað er eyðsæð, at fáa vit eitt stórt reiðarí sum kunda, verður skjótt brúk fyri fleiri starvsfólkum, sigur Lassi Borðoy.

Um so verður, væntar hann ikki tað fer at gerast trupult at fáa fólk, serliga við kombineraði skipanini, har fólk er úti eina tíð og so heima eina tíð. Serliga útisiglarar hava hug at fáa eitt slíkt starv, heldur Lassi Borðoy.

Annars verður móttøka í sambandi við at CMM flytir í nýggj hølir á fjórðu hædd á Saltsøluni fríggjadagin 23. mai millum klokkan 15 og 17.

# Heimasíðan hjá Faroe Petroleum innstillað til virðisløn



**Heimasíðan hjá Faroe Petroleum, er innstillað til virðisløn í bretsku kappingini AIM Investment Awards '08**

INNSTILLING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er bretska íløgublaðið Investor's Cronicle, eitt av bløðunum hjá Financial Times, ið stendur handan kappingina.

Faroepetroleum.com er innstillað í kategoriini Best AIM website, og um heimasíðuna stendur at lesa: 'clear, concise and very good at explaining strategy'.

Á føroyskum merkir hetta at heimasíðan er greið, beinrakin og sera góð til at greiða frá strategi.

Heimasíðan er stílað til íleggjar og møguligar nýggjar íleggjarar, og tað stuttliga við henni er, at hon er føroyskt framleidd frá enda í annan, um sæð verður burtur frá Stock info, ið verður importera frá øðrum veitara. Tað er samskiftisvirkið Sansir, ið hava gjørt heimasíðuna, ið er bygd á føroysku Sansir.net skipanina.

Millum hini innstillaðu í hesari kategori eru ein ensk medicinalfyritøka og ein írsk fruktfyritøka, so Faroe Petroleum er komið í altjóða selskap.

Vinnararnir verða funnir á stórari veitslu í London tann 29. mai, og tá verður spennandi at síggja, hvussu leikur ferst.

Heimasíðan kann síggjast á www.faroepetroleum.com.